# Okkurt serstakt frá Jamm

**Ongin endi tykist vera á hugskotunum aftanfyri hondgjørdu lutirnar, sum eru at finna í Jamm í Klaksvík. Og vilt tú gera títt heilt egna hugskot til veruleika, eru tær báðar Meiken og Ása fúsar at átaka sær uppgávuna**

HONDARBEIÐI
*Elin Neshamar*
*praktikantur*

Stutt fyri jól lat ein sera forvitnisligur handil upp í Klaksvík. Tað eru tær báðar Meiken Steinberg og Ása Justesen, sum reka handilin Jamm, har allar vørurnar eru hondgjørdar, og tú neyvan finnur tvær av sama slagi.



*Ása og Meiken, sum reka Jamm í Klaksvík, gera eisini sjálvar teir allarflestu av lutunum í handlinum. Eisini fara tær fegnar undir góð hugskot hjá øðrum, um fólk ynskja tað*

### Hugskot í bíðirøð

Tað tykist, sum at ongin endi er á hugskotunum til nógvu hondgjørdu lutirnar, sum eru at síggja í Jamm. Her finnur tú alt frá taskum úr troli og smúkkum úr glasi til pløgg og sera øðrvísi páskapynt. Tað eru Ása og Meiken, sum gera teir flestu av lutunum, men frætta tær um onkran, ið framleiðir okkkurt serstakt, taka tær fegnar ímóti.

Spurdar, um tær ongantíð verða tómar fyri hugskot, siga Meiken og Ása, at tað heldur er tvørturímóti.

– So skjótt eg eri liðug við ein lut, standa hundrað onnur hugskot og bíða. Og hugskotini koma allastaðni frá. Um eg til dømis síggi eitt spennandi slag av toyi ella ein øðrvísi knapp, síggi eg skjótt fyri mær, hvat hetta møguliga kundi verði brúkt til, sigur Meiken. Tað er Meiken, sum fæst við lutirnar, sum eru úr ull og tógvi, meðan Ása fyri tað mesta seymar.



*Fingradukkur, eggjahitarar, húgvir og breyðhaldari er bara eitt sindur av tí sera forvitnisliga páskapyntinum, ið er at fáa í Jamm*

### Fólk tora væl

Tað skerst ikki burtur, at nógv av pløggunum í Jamm eru so sermerkt, at øll neyvan høvdu torað at gingið í teimum. Ása heldur tó, at fólk tora nógv betri enn hon hevði vænta, tá tær byrjaðu við handlinum.

– Tá fólk fyrst hava keypt okkurt her í Jamm eina ferð, koma tey ofta aftur. Eisini fyri at bíleggja okkurt, sum er gjørt eftir teirra persónliga sniði. Sjálvt um tú, í vanligum handlum kanst keypa klæðir í tíni stødd, er tað ikki vist, at tey sita, júst sum tey skulu, tí fólk eru so ymisk, sigur Ása.

Umframt at fáa seymað klæðir eftir máti, kanst tú eisini koma inn á gólvið í Jamm við einum hugskoti og fáa Ásu og Meiken at gera lutin ella plaggið.

Tær báðar eru rættiliga sannførdar um, at tað trýtur ikki við áhugaverdum hugskotum millum fólk, men at nógv kanska aftra seg við at fara í holt við tað. Tí fara tær eisini at bjóða fólki skeið í teimum ymsu hondarbeiðsteknikkunum, um áhugi vísir seg at vera fyri tí.

# Forvitnislig skóleistakapping

**So er tíð at fáa ferð á hugflogið og stokkarnar, so tú kanst vera við í skóleistakappingini hjá Jamm í Klaksvík**

SKÓLEISTAKAPPING
*Elin Neshamar*
*praktikantur*

Sum eitt sera øðrvísi átak skipa tær báðar Meiken og Ása í Jamm nú fyri skóleistakapping. Hetta ikki bert fyri at skaffa nýggjar uppskriftir, men eisini fyri at varpa ljós á skóleistar, sum eitt heilt serføroyskt fyribrigdi.

### Partur av mentanararvinum

Ása greiðir frá, at hóast skóleistar kanska ikki upprunaliga eru úr Føroyum, eru tað næstan bert føroyingar, ið hava hildið fast við henda fjálga fótbúna. Allir føroyingar vita, hvat skóleistar er fyri nakað, men soleiðis er ikki í øðrum londum, og tí er sera sjáldan tú finnur uppskriftir til skóleistar í ymsu bindibókunum. Bert fáar kvinnar her heima hava skrivað nakra skóleistauppskrift niður, so kappingin er eisini sett í verk fyri betri at varðveita hendan partin av okkara mentanararvi.

– Um tú til dømis spyrt eina konu, hvat fyri skóleistar hon bindur, sigur hon óivað, at hon bara bindur “vanligar” skóleistar, hetta hóast næstan eingin bindur teir somu, sigur Ása. Hon leggur afturat, at um tú í dag fert inn í eina bindibúð og biður um eina uppskrift til skóleistar, so hava tey kanska bert ta einu. Ætlanin við kappingini er so at fáa ymsu modellini fram, og síðani skriva uppskriftirnar niður og geva fólki høvi at keypa tær. Hetta sjálvandi í tann mun, luttakararnir í kappingini vilja tað.

### Stórur áhugi

Fyri tíðina binda føroyskar kvinnur nógv, men tað tykist sum tað er serliga tað eldra ættarliðið, ið bindur skóleistar. Ása og Meiken vóna, at fáa so nógv ymisk sløg av skóleistum inn til kappingina, sum til ber. Summir skóleistar eru fínari enn aðrir, summir eru sera stuttligir og litfagrir og bara hugflogið setur markið fyri, hvussu teir skulu síggja út.

Skóleistakappingin byrjaði 1. mars, og er áhugin sera stórur. Luttakarar eru úr øllum landinum, til dømis ringdi ein kona úr Suðuroy at frætta meir um kappingina, meðan vit vóru inni í handlinum.

At enda siga tær báðar, at onki skóleistapar verður sýnt fram áðrenn nakað annað – øll verða tey hongd upp í senn.

Seinasta freist at lata skóleistar inn er leygardagin 15. apríl, og verður vinnarin funnin við atkvøðugreiðslu millum kundarnar í handlinum.



*Í løtuni finst bert hendan eina uppskriftin til skóleistar. Ása og Meiken vóna, at skóleistakappingin fer at økja munandi um úrvalið av uppskriftum*